*Det føltes som et frisk Luftdrag med Bud om Vaar og Sommer, da det glade Budskab fløj over Lande, at vi paa en Gang skulde blive befriede for det rytterske Embedskompagnis tre øverste Spidser ... som en Udluftning af aargammelt Mug og lummer Sengehalm.*

Tað vildi so til, at fólkatingsvalið og løgtingsvalið fullu næstan samstundis, tað fyrra var tann 22. apríl og tað seinna tann 24. apríl 1918. Á tí fyrra valinum fall Edw. Mortensen, og Andrass Samuelsen varð valdur. Dimmalættingar sigursæla viðmerking um hetta sigur ikki lítið um tað politiska áralagið í Føroyum um hetta mundið:

*I Gaar saas Edw. Mortensen paa Folketingets Tilhørerplads hvorfra han misundelig kiggede ned paa sin sejrrige Modkandidat Hr. Samuelsen.*

Men á løgtingsvalinum tveir dagar seinni var sambandið fyri ósigri. Víst fekk sambandið fleiri atkvøður enn sjálvstýrið, men av valtekniskum grundum fekk sjálvstýrið fyri fyrstu ferð meiriluta á tingi, 11 tingmenn ímóti sambandsins 9 tinglimum. Tað nýggja løgtingið valdi Jóannes Patursson til landstingsmann.

## Ein próstasetan

Um hetta mundið vóru Føroyar, í stóran mun orsakað av adressumálinum, komnar inn í eitt tíðarskeið, eyðkent av einum nýggjum paradigma, har sjálvstýrið nú hevði somu yvirvág, sum sambandið fyrr hevði havt. Stríðið millum báðar partar linkaði ikki av hesi grund, men helt fram við óminkaðum beiskleika.

Serliga eitt mál fekk eld í sinnini, kanska tí tað hevði so stóran mentanarpolitiskan týdning. Spurningurin var hesin: hvør skuldi taka við sum próstur aftan á A.C. Evensen, sum var deyður á vetri 1917?

Av trimum umsøkjarum komu bara tveir, Gulak Jacobsen, prestur í Suðuroy, og Jákup Dahl, prestur í Suðurstreymoy, upp á tal. Sambandið helt upp á Gulak Jacobsen, sjálvstýrið upp á Jákup Dahl. Báðir umsøkjararnir vóru yrkjarar, men annars er neyvan nakar ivi um, at Dahl, sæð frá øllum sjónarmiðum, var maðurin við tí dyggara førleikanum.

Hann hevði tá virkað sum fyribils settur próstur og víst, at hann megnaði at gera umsitingarligt arbeiði. Hann hevði skrivað ta fyrstu fullfíggjaðu, føroysku málløruna, týtt ritualini, týtt meginpartin av sálmunum í Gamla Testamenti til føroyskt, hann hevði umsett Markusar evangelium (sum tó ikki var givið út), og hann var um at leggja eitt sálmabókauppískoyti til rættis saman við Símuni av Skarði, og hann hevði bæði yrkt og týtt ein hóp av sálmum og víst, at hann átti sannar skaldagávur.

Hóast Dahl soleiðis var framúr væl skikkaður til próstaembætið, er lætt at skilja, at hvørki Rytter ella sambandsins oddamenn vildu hava hann settan sum próst. Tí var nakar maður, sum í sínum persóni umboðaði sjálvstýrisins mentanarpolitisku stremban, so var tað Jákup Dahl.

## "En smuk Mand"

Rytter mælti til at seta Gulak Jacobsen, og biskuppurin, Ostenfeld, fylgdi hansara tilráðing. Men eina ferð enn gjørdi Edward Mortensen-ávirkanin seg galdandi, og eina ferð enn valdi danska stjórnin at fara í part við sjálvstýrinum ímóti Rytter og sambandinum. Tann danski kirkjumálaráðharrin, Poulsen, setti, ímóti biskupsins ynski, á sumri 1918 Jákup Dahl í embætið sum Føroya próstur.

Fyri sambandið var hetta ein serliga svárur smeitur. Flokkurin hevði vant seg við, frá tíðini tá ið tann myndugi Fríðrikur Petersen hevði havt valdið, at prósturin var teirra maður. Nú bleiv ein rættiliga ungur og sera virkin prestur settur, sum ikki bara var sjálvstýrismaður, men hevði sett sær sum mál at týða halgubók til føroyskt. Málið vakti stóran ans, og Dahls eginleikar og enntá hansara útsjónd vórðu umrødd á fólkatingi, har Andrass Samuelsen m.a. segði hesi ógloymandi orð:

*Nu fik man det Indtryk af den højtærede Kirkeministers Udtalelser, at jeg oven i Købet havde sagt, at Provst Dahl ikke var nogen smuk Mand: Ministeren opdagede imidlertid, at hann var en smuk Mand. Jeg maa paa det allerbestemteste benægte at have udtalt noget som helst om, at Hr. Dahl ikke var en smuk Mand.*



Poul Niclasen, sum í 1918 gjørdist blaðstjóri á Dimmalætting, umboðaði eitt nýtt, grønari samband



Jákup Dahl varð í 1918 settur í embætið sum Føroya próstur. Henda próstasetan vakti miklan ans, og enntá Jákups útsjónd varð umrødd í ríkisdegnum. Myndin er tikin í Karise, har Dahl var lærari 1906-07

## Trúbótin fullførd

Fáur man í dag duga at gera sær greitt, hvussu stóran týdning henda próstasetan á sumri 1918 fekk fyri okkara lítla oyggjaland á síni trilvandi leið inn í modernitetin. Við hesi útnevning fekk tað bíbilska týðingarverkið hjá Jákupi Dahl eina tilelving og ein myndugleika, sum bara kundu vaksa um tess týdning.

Ein grundtanki bæði hjá Dahl og háskúlamonnunum var jú, at trúbótin gamaní var komin til Danmarkar og Íslands, men at hon, so leingi móðurmálið ikki var kirkjunnar og skúlans mál, ikki av røttum var komin til Føroya. Tað fall, sum Elsa Funding greiðir frá í sínum verki um føroyskar bíbliutýðingar, Jákupi Dahl, Victor Danielsen og K.O. Viderø í lut at laga hetta seinasta klípið í Luthers garð her heima. Seinni komu tær apokrýfisku bøkurnar í týðing eftir Axel Tórgarð.

## Sambandið grønkar

Um hetta mundið blástu paradigmuskiftisins vindar yvir um stikið og inn á sambandsins markir. Í sambandinum hevði ment seg ein nýggjur tjóðskaparligur vongur, sum vildi mýkja tað stívrendu og stirvnu kósina, sum Oliver Effersøe, Fríðrikur Petersen, Andrass Samuelsen og Oluf Skaalum høvdu umboðað. At tað eisini fyrr høvdu verið røddir, sum ikki vildu ganga tann gráa og grýtuta sambandsvegin, er Anton Degn eitt gott dømi um.

Umboð fyri hesa nýggju leiðina vóru m.a. Poul Niclasen og H.C.W. Tórgarð. Tá ið sjálvstýrisins nýggi løgtingsmeiriluti í 1918 og 1919 samtykti at avtaka ásetingarnar í grein sjey, komu hesir báðir við einum broytingaruppskoti, sum lá nakað miðskeiðis millum sjálvstýris- og sambandsstevnuna, og sum kanska um hetta mundið hevði verið ein rímilig loysn á hesum máli. Men teirra uppskot fall, danska stjórnin vildi ikki eftirlíka sjálvstýrisins samtykt, og sostatt stóð grein sjey við líka til 1938.

Eitt annað dømi um sambandsins mýktu kós var tað, at Poul Niclasen varð settur sum blaðstjóri á Dimmalætting. Poul Niclasen var, so tykist ið hvussu er, ein frísinnaður maður við livandi áhuga fyri søgu og mentan. Hann dugdi væl at skriva føroyskt, og hereftir sóust oftari og oftari, sum teigar av grønsku og gróðri, føroyskar greinar í Dimmalætting.

Tann svarta junkaratíðin var farin.

Hans Andrias Sølvará: Adressumálið. Um donsk-føroysk viðurskifti undir fyrra heimsbardaga. Fróðskapur 2007. 172 síður. Kr. 200.